

# Obama ella McCain?

**Politisk aktivisma á San Diego State University**

FORSETAVAL

*Janus á Ryggi*
*Myndir: Gunnhild Dahl Niclasen*

Í hesum døgum reika sjey lesandi av Fróðskaparsetri Føroya á California State University í San Diego. Universitetið telst millum tey størstu í Kalifornia við eini 35.000 lesandi. Í hesum døgum er alt universitetsøkið eyðkent av amerikanska valstríðnum, ið nú er komið í hæddina. Hvar ein so vendir sær, hoyrast rópini "Democrats; register here!"og "Republicans; register here!". Í øllum hornum síggjast básar, ið umboða teir báðar flokkarnar, ið hava nakran veruligan møguleika at vinna forsetasessin. Hjá teimum snýr tað seg um at fáa fólk at skráseta seg til at atkvøða, og at fáa sín politiska boðskap út til stóru fjøldina av lesandi, ið dagliga ferðast á økinum. Hvørja ferð onkur teirra nærkast onkrum okkara við einari áheitan um at skráseta okkum, er svarið hitt sama: Vit eru evropearar og hava ikki møguleika at atkvøða í USA. Samstundis stendur greitt, at vit eru vitni til eitt valstríð, ið kann fáa stóra ávirkan á amerikanska samfelagið og reystina av heiminum. Báðir partar føra seg fram sum røttu loysnina og dylja ikki yvir, at hin parturin fer at føra amerikanska samfelagið í ófórið. Allastaðni ljóðar, at búskaparstøðan hjá vanliga amerikanaranum hevur hægstu raðfesting í hesum valstríðnum í mun til amerikanskan uttanríkispolitikk og kríggið í Irak í undanfarna vali.

## College Democrats

Angel Perez er talsmaður fyri College Democrats. Hann er trúgvur Obama stuðul og tá vit hittu hann fegnaðist hann um, at evropearar sýndu demokratunum áhuga. Hann ger okkum greitt, at Barack Obama er nógv betri umtóktur millum lesandi í Kalifornia enn John McCain. Hetta sigur hann síggjast aftur á limalistanum hjá sínum felagsskapi. Í løtuni er Barack Obama frammanfyri John McCain í øllum veljarakanningum. Á San Diego State University tykjast hvørki professarar ella lesandi at dylja yvir sínar politisku sannføringar til fyrilestrarnar. Hetta er eitt sindur øðrvísi enn vit eru von við. Eitt nú segði ein professari við okkum tá vit hittu hann, at hann helt, at núverandi forsetin George W. Bush átti at verið rættarsøktur fyri krígsbrotsverk vegna kríggið í Irak.

## Stuðla Obama

Demokratiska forsetavalevnið Barack Obama hevur valt at gera sonevnda miðalklassan til høvuðstema í sínum valstríði. Høvuðsboðskapur hansara hevur støðugt verið, at Bush stjórnin saman við repulikanska forsetavalevninum John McCain hava svikið miðalklassan og ístaðin hava røkt áhugamálini hjá seráhugabólkum og stórum vinnulívsbólkum. Boðskapurin hjá Barack Obama snýr seg um at fáa gerandisdagin hjá vanliga amerikanaranum á breddan aftur. Lítil ivi er um, at hetta gevur afturljóð hjá mongum amerikanarum í hesum døgum, eitt nú hava amerikanskir fjølmiðlar gjørt nógv burturúr, at milliónir av amerikanarum noyðast at liva av sonevndum "food stamps", sum í roynd og veru merkir, at hesi liva fyri nakrar fáar dollarar um dagin. Orsøkin er vaksandi arbeiðsloysi í USA.

- Fyri okkum er eingin ivi um, at Barack Obama hevur fingurin á pulsinum og tosar um tey mest átrokandi evnini fyri vanliga amerikanaran, eitt nú arbeiðspláss, umhvørvið og ein skilabetri uttanríkispolitikk. Obama hevur neyðugu visiónina og ætlanirnar fyri framtíðina, ímeðan John McCain vantar veruligar ætlanir fyri framtíðina. Fyri okkum lesandi hevur Barack Obama nakað veruligt at bjóða, eitt nú við at gera fígging til lesturin meiri atkomiligan.

## College Republicans

Eg hitti McCain viðhaldsmannin Ray Rudolph á universitetsøkinum á San Diego State University. Hann er partur av politiska felagskapinum "College Repulicans" og roynir at sannføra lesandi um, at hóast John McCain stendur seg væl verri í seinastu veljarakanningunum, er hann framvegis rætti maðurin til forsetasessin.

Tað stendur øllum greitt, at búskaparliga støðan er ein av stóru lyklaknútunum í valstríðnum. Eygleiðarar meta, at hetta er ein av stóru avbjóðingunum hjá John McCain um tað skal eydnast honum at venda neiligu veljarakanningunum. Hetta ger hann við at tosa nógv um komandi skattapolitikkin hjá sær, har hann setir sær fyri at lækka skattirnar, eitt nú fyri vinnulívið. Hann skýrir Barack Obama fyri at vilja føra ein burturvið búskaparpolitikk við skattahækkingum sum fara at gera búskaparstøðuna nógv verri, eitt nú fyri smáar fyritøkur. Ákæran er, at Barack Obama fer at taka óneyðugan pening í skatti frá fólki at brúka til egin áhugamál.

## John McCain rætti maðurin

Ray Rudolph heldur ikki, at tað er nakar trupuleiki at fáa ung lesandi at velja John McCain hóast hann er komin væl upp í árini, tvørturímóti heldur hann, at tey ungu skilja, at hetta merkir politiskur búnaskapur.

- Fyri republikanarar hevur tað størstan týdning at minka um almennu fyrisitingina og John McCain er rætti maðurin til at fremja tað. Republikanarar hugsa meira við heilanum enn við hjartanum. Eg haldi at rómurin uttanum Obama sum er at hóma í løtuni fer at dala, tá fólk sær at tað er bert tos. Omaba prátar, men McCain hevur royndirnar. Hóast demokratarnir siga tað øvugta, so vita vit, at tey ríkastu longu rinda største skattin, tí er tað sera týðandi at lækka skattin hjá vinnulívinum. Gera vit ikki tað er vandi fyri, at vinnulívið ikki longur fer at bera seg, sigur Ray Rudolph.

Í valstríðnum hava John McCain og hansara viðhaldsfólk ført fram, at demokratiska forsetavalið Barack Obama, fer at leggja ovurstungar skattir á fólk og serstakliga vinnulívið. At hann fer at gera júst hitt øvugta av tí, sum John McCain setir sær fyri, nevniliga at minka almennu fyrisitingina og almennu útreiðslurnar.

- Eg haldi at Barack Obama fer at føra ein vandamiklan politikk. Hann vil hava eitt Big Brother samfelag við einari stórari almennari fyrisiting. Eg haldi ikki hann er sjálvstøðugur, heldur tvørturímóti er hann loyalur mótvegis sínum flokki. John McCian hinvegin hevur sjálvstøðugar hugsanir. Eg beri ótta fyri, at vinnur Obama, fer




*Valstríðið í USA koyrir upp á tað harðasta. Týsdagin 4. november fellur avgerðin*